# Strandferðslustjórin fer í nýtt starv

**Kristian Reinert Davidsen hevur boðað frá, at hann fer frá sum stjóri á Strandfaraskipum Landsins. 1. oktober tekur hann við starvi hjá FT International, sum er altjóða deild hjá Føroya Tele.**

SAMFELAG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Kristian Davidsen hevur verið stjóri hjá Strandferðsluni síðani 1. januar 2003, og hann sigur, at orsøkin til uppsøgnina er, at hann hevur tikið við nýggjum avbjóðingum á Føroya Tele, á FT International sum Networks Director. Hann tekur við nýggja starvinum 1. oktober í ár.

Og hann greiðir frá, at stórar broytingar hava verið á samferðsluøkinum seinastu árini. Undirsjóvartunlarnir merkja, at Vesturleiðin og Leirvíksfjarðarleiðin eru niðurlagdar, og nýggi Smyril er umsíðir settur í sigling eftir eina heldur drúgva byggitilgongd. Harumframt eru Farmaleiðir seldar. Fyri Strandferðsluni hevur hetta merkt stórar broytingar – serstakliga fyri starvsfólkini, sum eru vorðin munandi færri í tali bæði á operativu eindunum og í fyrisitingini. Nógvu broytingarnar hava sett stór krøv til bæði leiðslu og starvsfólk á SL.

– Á FT International verður arbeitt við ætlanum, sum eg vænti fara at skapa nýtt virksemi hjá Føroya Tele uttanlands, og tí gleðist eg um at fáa møguleika til at verða partur av hesari tilgongd, sigur fráfarandi strandferðslustjórini.



*Tróndur Djurhuus, stjóri í FT International, heilsar Kristiani Davidsen vælkomnan*

## Altjóða royndir

Sambært Trónda Djurhuus, stjóra í FT International, fegnast hann um, at Kristian Davidsen nú gerst partur av leiðsluni har:

– Mál okkara eru ambitiøs og krevja hart og miðvíst arbeiði yvir eitt longri áramál. Tey krevja eisini tey allarbestu starvsfólkini við altjóða royndum. Kristian er við sínum útbúgvingum og royndum júst tann rætti persónurin. Umframt tær hollu leiðsluroyndirnar, sum hann hevur ognað sær sum stjóri á Strandferðsluni, hevur hann ta røttu bakgrundina innan økið, sum hann nú skal hava ábyrgdina av, sigur Tróndur Djurhuus.

FT International, sum er altjóða deild hjá Føroya Tele, skal byggja upp nýggjar inntøkur úr útlondum við útflutningi, íløgum og rakstri uttanlands.

– Sum verkfrøðingur hevur Kristian í fleiri ár havt viðkomandi leiðandi størv hjá svenska telerisanum L. M. Ericsson. Eitt nú var hann í síni tíð deildarstjóri hjá Ericsson, og hann var leiðari hjá verkfrøðingum og øðrum serfrøðingum úr fleiri londum, tá Ericsson fór undir at menna júst tær tøknirnar, sum FT International nú hellir seg at í sínum arbeiði, sigur Tróndur Djurhuus.

---

*Framhald av s. 10*

skafti á almanna- og heilsuøkinum, og tá tað snýr seg um tær fráboðaðu ætlaninar fyri hetta nýggja tingárið.

**Konstruktivt politiskt samstarv**

Eg skal sjálvsagt halda meg til tey sosial- og heilsupolitisku málini, sum eru løgd fram. Men eg vil byrja við at lýsa nøkur av teim nógvu málum, sum eru fingin av skafti á tí økinum í hesum landsstýrisskeiðinum - flestøll málini strekkja seg jú yvir fleiri ár við drúgvum og seigum arbeiði. Og so eru tey framd í flestøllum førum í einum konstruktivum samstarvi millum samgongu og andstøðu í Trivnaðarnevndini.

**Nógv er fingið av skafti**

Lat meg nevna m.a.

1. **Barnaverndarlóg**: vit hava fingið nýggja føroyska barnaverndarlóg í staðin fyri ta gomlu donsku, og alt barnaverndarøkið er blivið skipað, lands og í nýggjum kommunalum samstarvseindum
2. **Sjúkrahúslóg**: vit hava fingið nýggja sjúkrahúslóg, nýggja skipan við sjúklingaráði, betri skipan av visitatión til viðgerð uttanlands og fyrsta lógargrundarlagið fyri heilsutilbúgving í Føroyum
3. **Fyribyrgjandi heilsutænastur**: vit hava fingið nýggja skipan um fyribyrgjandi heilsutænastur fyri børn og ung
4. **Tubbakslóg**: vit hava fingið nýggja tubbakslóg fyri at víðka um roykifría umhvørvið og byrgja fyri at ung fara at roykja
5. **Heilsuavgjøld**: í 2 umførum hava vit lagt hægri avgjald á tubbak og fleiri ikki-heilsugóðar vørur fyri at tálma nýtsluna av hesum
6. **Skúlaheilsuátøk**: vit hava sett heilsuátøk í verk í fólkaskúlanum, so okkara børn kunnu taka reint og kalt vatn og frukt fram um ósunnar sukur- og fitivørur
7. **Talgild heilsuskipan**: verkætlanin um talgilda heilsuskipan, størsta KT-verkætlan í Føroyum, verður liðugt implementerað og tikin í nýtslu seinni í ár
8. **Dopinglóg**: vit hava fingið Føroya fyrstu dopinglóg
9. **Autorisatón av heilsustarvsfólki**: vit hava fingið autorisatiónslóggávuna fyri 3 týðandi heilsustarvsbólkar uppá pláss, nevnliga sjúkrarøktarfrøðingar, bioanalytikarar og radiografar
10. **Ílegugransking**: lógargrundarlagið fyri gransking í mannaílegum er skipað, og vit eru farin undir at skipað ílegusavnið sum kjarnustovnin í hesum granskingarvirki
11. **Røntgen-nútíðargerð**: við eini verkætlan uppá tils. 26 mió. kr. árini 2005-07 verður framd ein digitalisering og útskifting av røntgenútgerðini á øllum trimum sjúkrahúsunum, har tann síðsta røntgenstovan á landssjúkrahúsinum verður gjørd í komandi ári
12. **Diabetes viðgerð**: á øllum trimum sjúkrahúsunum eru nú skipað diabetes-ambulatorium, og betri tilboð eru fyri insulinviðgerð av diabetessjúklingum
13. **Psykiatriin:** stór framtøk eru gjørd á psykiatriska økinum, sum er raðfest hægri enn nakrantíð, bæði í íløgum og rakstri, m.a. við eini sosialpsykiatri við bústaðar- og virknistilboðum til sálarsjúk
14. **Samhaldsfasti**: inntøkugrundarlagið hjá fólkapensjonistum er styrkt við munandi hækkingum av Samhaldsfasta, og tá hann fyri triðju ferð verður hækkaður 1. jan. 2007, kemur hann uppá einar 2000 kr mánaðarliga til allar fólkapensjonistar
15. **Landssjúkrahúsið**: farið er undir nútíðargerð av Landssjúkrahúsinum við verklagslóg uppá 105 mió. kr. til fyrstu 3 árini av 10-ára verkætlan uppá íalt 350 mió. kr.
16. **Heilivágsframleiðslan** hjá Apoteksverkinum verður nútímansgjørd og útbygd við verklagslóg fyri 2006-07 uppá 20 mió.kr.
17. **Røktarheim og eldrasambýli**: nýggj stundningslóg skal árini 2006-2008 við 51 mió. kr. stuðla útveganini av 136 nýggjum eldrabúplássum - hetta aftaná at henda samgongan eisini hevur fullført ætlanina hjá undanfarnu samgongu um 123 búpláss, við at útvega tað mesta av íløgukostnaðinum (íalt 34 mió.kr. í 2004 og 05) og allan rakstrarkostnaðin (sum sæst aftur í at raksturin í eldrarøktini er øktur við 50 mió.kr. frá 2003 til 2006)
18. **Heimleys**: uppskot um heimleys var fyri á løgtingi í vár, og lógaruppskot verður lagt fyri tingið í heyst
19. **Fólkaheilsuætlan**: fyrsta føroyska Fólkaheilsuætlanin fekk góða undirtøku í løgtinginum, og harvið er fyrstu ferð orðaðir yvirskipaðir fólkaheilsupolitiskir málsetningar og ítøkiligar ætlanir um fólkaheilsupolitisk átøk
20. **Brekað børn**: nýggj stuðulsskipan fyri brekað børn varð sett í verk í vár, og við nýggjari grein í dagstovnalógini fáa børn við serligum tørvi javnbjóðis atgongd við onnur børn til kommunalu ansingartilboðini
21. **Arbeiðsskaðatryggingarlóg** er á veg – uppskotið varð gjørt liðugt í Almanna- og heilsumálaráðnum og verður nú lagt fram av Vinnumálaráðnum
22. **Pandemi tilbúgvingarætlan**: við skjótum og effektivum nevndararbeiði hava vit fingið eina Pandemi-tilbúgvingarætlan – ein tann fyrsta í Norðanlondum. Samstundis eru tikin øll neyðug stig í heilivágstilbúgvingini í samband við eina møguliga influensa-pandemi, heimsfarsótt við beinkrími

Listin kundi verið væl longri við fleiri øðrum málum aftrat, sum gera ábøtur og nýskapanir í lógar- og kunngerðarverki og fyriskipanum á almanna- og heilsuøkjunum. Men tað verður ov drúgt at taka alt við her.

Í næsta parti fari eg so at venda mær til tey høvuðsmál, sum eru sett á skránna fyri hetta nýggja tingárið.